SOSIALURIN

Útgevari:
FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR

Blaðstj.:
Villi Sørensen.
Box 76.

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
TELF 1820

Ólóglig verkføll

Ólóglig verkføll eru hvørki ókend her hjá okkum ella í grannalondunum. Hvat tey kosta arbeiðarafjøldini og samfelagnum, kenna vit eisini, og hartil kemur hin niðurbrótandi ávirkanin á rættstøðuna í landinum.

Slíkum óskili, ið aldri verður arbeiðarafjøldini at gagni, mugu vit sjálvandi koma til iívs, og tað er heldur eingin ivl um, at eingin ábyrgdarkennandi arbeiðaraleiðari nakrantíð vil finna upp á at føra arbeiðarar í slíkt óføri; men vit eiga ikki at vera blindir fyri, at tað eisini kunnu finnast ábyrgdarleysir arbeiðaraleiðarar, ið fyrilitarleyst eru til reiðar at offra arbeiðarafjøldini fyri persónligan og politiskan vinning at fremja.

Arbeiðarar kunnu ikki gerast sekir til dóms og harðar peningabøtur um slík mistøk verða gjørd, og tí má tað skrásetast í ARBEIÐSINS GRUNDLÓG, ið javnaðarflokkurin vil leggja til brots fyri at fáa framda, at hvørki feløg ella einstakir arbeiðarar kunnu áleggjast peningabøtur fyrr enn rætturin hevur dømt eitt møguligt verkfall fyri ólógligt at vera. T.v.s., at um tað skuldi hent, at farið verður út í ólógligt verkfall, má einki felag og eingin arbeiðari koma undir revsing í tíðarskeiðinum, ið liggur í millum byrjan verkfallsins og dómsavgerðina.

Verður verkfall dømt ólógligt, men hóast dómsavgerðina heldur áfram, verður hetta, eins og í øllum rættssamfeløgum, at rokna sum lógarbrot og dømt eftir galdandi revsingarlógum.

Hetta er ein týðandi táttur í allari arbeiðararørslu og fyri samfelagið sum heild. Tí verður ongatíð ov skjótt farið til verka fyri at fáa í lag eina hóskandi arbeiðaralóggávu.

RØNTGEN

Listar hava verið bornir út í hús til innsavnan av peningi til eitt røntgentól. Bløðini hava boðið sær til at taka móti peningi eisini; men sum vera man, verður tað ikki stórur peningur, ið tey fáa, tí høgligari er hjá fólki at lata peningin til teirra, ið ganga við lista. Seinasti dagur, ið loyvdur er til innsavnan, er 5. nov., og vit heita á tey, ið ikki havi latið enn, at fáa hetta í lag, áðrenn ov seint verður. Vit vilja fegin taka móti peninginum. Hesa vikuna hava vit fingið frá M.J.S. 20 kr. Tilsamans hava vit nú fingið 81 kr.

Ítróttin

Tað eru bert tær fáu bygdirnar, ið eiga slíkt høli, at ungdómurin fær íðka ítrótt innandura um vetrarnar. Her hevur ungdómurin, feløgini, kommununrnar og løgtingið eina stóra uppgávu at loysa. Endamálið her má vera stutt og greitt: bygdarhús í hvørjari bygd; eitt hús, ið kann loysa samkomuspurningar av øllum slagi og teirra millum allar spurningar í samband við innandura ítrótt. Vit hava ikki ráð til at byggja hús til hvørt endamál einsæris. Mest møguligt má samlast saman undir somu lon.

Havnar Fimleikarfelag, ið altíð hevur nógvar luttakarar, er farið til arbeiðis. Eisini Klakksvíkin er væl við í ár. Umframt kvinnurnar er nú eisini mannsfimleikurin byrjaður — einir 40 unglingar í tali.

Ferðaleiki

Tað er veruleiki:

at landstýrisflokkarnir ikki hava hækkað ellis- og avlamisrentuna síðan 1952, hóast prístalið er farið 23 stig upp.

at hitt nú friðaða sjóøkið um Føroyar er munandi størri enn tað, ið vinnast kundi sambært uppskot tjóðveldisflokksins.

at hóast Føroyar kunnu føða so nógvar hønur sum vera vil, og føroysku eggini eru nakað vælbetri enn tey útlendsku, flyta vit inn fyri umleið 300.000 kr. í eggum á hvørjum ári.

at landsstýrið nú gongur biddaragongd til danir um at fáa miljónpening til vegirnar, hóast vegamálini eru yvirtikin sum føroysk sermál.

at tað var Bláhamar, ið so hjartaliga ynskti, at hjúnarlagið millum sambandið og fólkaflokkin aldri mátti slitna aftur.

Klakksvík í dag —

Framh. av 2. s.

Sjúrðarberg kom ígjár úr Grønlandi við 330 tonsum.

Eystanífrá frættist frá vánaligum veðri og lítlum fiskiskapi.

Samlaða veiðan hjá agnsildabátunum var 430 tons.

Niklái Poulsen, lærari í Árnafirði, hevur fyribils tikið við lærarastarvinum eftir J. P. Joensen, skúlaráðgevara. Ætlandi verður Heðin Jensen av Tvøroyri fyribils at taka við starvinum í Árnafirði.

Ætlanin er at hava bókadagskvøld í Klakksvík komandi leygarkvøld.

Alla komandi viku heldur heimamisjónin misjónsviku í Klakksvík.

50 børn vórðu fødd í Klakksvík í juli ársfjórðingi.

Skuespillerinde fru Ellen Malberg

giver i tidsrummet 5. november—23. november 1956 en række oplæsningsaftener på Færøerne, således:

Forestilling i Thorshavn (Sjónleikarhúsið) tirsdag d. 6./11. 1956.
— - — (K. F. U. M.) onsdag d. 7./11. 1956.
— - Klaksvig fredag d. 9./11. 1956.
— - — lørdag d. 10./11. 1956.
— - Ejde søndag d. 11./11. 1956.
— - Fuglefjord mandag d. 12./11. 1956.
— - Vestmanhavn onsdag d. 14./11, 1956.
— - Midvåg torsdag d. 15./11. 1956.
— - Sand fredag d. 16./11. 1956.
— - Tverå lørdag d. 17./11. 1956.
— - Våg søndag d. 18./11. 1956.
— - Thorshavn (K. F. U. M.) onsdag d. 21./11. 1956.
— - — (K. F. U. M.) torsdag d. 22./11. 1956.

Billetpris 3 kr. Billetsalget til premieren foregår i Ferðamannafelagið — de øvrige aftener ved indgangen.

OKKARA VIÐSKIFTAFÓLKI

siga vit frá, at vit hava opnað avgreiðslu fyri inn- og útgjaldingar

Í RUNAVIK

í húsum Anthon Johannesens. telf. 17.

P.f Sjóvinnubankin

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

hevur aðalfund mánakvøldið 5. november kl 8³⁰ í erva í Losjuni.

Nevndin.

TRYGGINGARSAMBANDIÐ
FØROYAR

Føroya Kríggstrygging . telf. 1086
Føroya Brunatrygging .. telf. 1089
Føroya Sjóvátrygging ... telf. 1086
Føroya Vanlukkutrygging telf. 1721

Vit tryggja:

Bátar - skip - vøru - hús - innbúgv - ferðagóðs bilar o. a.

Føroyingar eiga at tryggja
í landsins egnu trygging

HÁSKÚLABASARURIN

Basarurin verður sum áður kunngjørt í gamla kommunuskúlanum sunnudagin 4. og mánadagin 5. novembur. Sunnudagin veráur byrjað kl. 16 og hildið á til kl. 22. Mánadagin byrjar hann kl. 10, og so verður hildið á, til liðugt er at selja. Tey, sum ætla at lata lutir, verða biðin um at bera teir í gamla kommunuskúlan, sum er opin millum kl. 16 og 18 hesa vikuna út.

Basarnevndin.

P-F. FÖROYA BANKI

(Stovnaður 1906)

Aðalskrivstova
TÓRSHAVN, telf. 1350

Útbankar:
Norðuroya deild
KLAKKSVÍK tlf. 274

Avgreiðsla:
MIÐVÁGI, tlf. 7

Suðuroyar deild:
TVØROYRI, tlf. 32

Renta av bankabók 3½% p. a.
Renta av innskoti við uppsøgn uppá 3 mánaðar 4%.

Skálafjørður—Sundalagið

Mánadagar og leygardagar seinnapart sigla mjólkabátarnir úr Havn kl. 15,00.

AS. Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik.